# Ársfrágreiðing FURs fyri árið 2021



26. MARS 2022

FØROYA UNGDÓMSRÁÐ

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ..... 2
Føroya Ungdómsráð ..... 3
Fíggjarlig viðurskifti ..... 3
Starvsstjórnin ..... 4
Dagliga virksemið ..... 4
Árligur stuðul ..... 4
Stuðulsgrunnur FURs ..... 6
Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs ..... 6
Heiðurslønir ..... 7
Dátuvernd ..... 8
Nýggj heimasíða ..... 8
Kanning - frítíðarvanar ..... 9
Kanningarúrslit ..... 9
Virði ..... 9
Avbjóðingar ..... 9
Langtíðarætlan ..... 10
Framløgur hjá feløgum í FUR ..... 10
Skeið um sosialar miðlar ..... 10
Lýsingastuðul - portal.fo ..... 10
Les og Lær í Føroyum ..... 11
Nevndarumboðan, skeið v.m. ..... 12
NordUng (fyrrverandi NSU) ..... 12
Nordic Youths in Sustainable Communities ..... 12
NUBF – ungdómsvenjing ..... 13
NUBF - Norðurlendski ungdómsgrunnurin ..... 13
Norðurlendsk verkætlan um umhvørvi og samskifti ..... 13
Umhvørvisjournalistikkur ..... 14
NORDBUK ..... 14
Ávirkanin av korona á børn og ung í Norðurlondum ..... 14
Dynamo – online skeiðspakki ..... 14

# Føroya Ungdómsráð

***FUR er felagsumboð fyri landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapir í Føroyum við 48 feløgum, harav 22 limafeløg og 26 lokalfeløg.***

Á landsfundi FURs varð nýtt landsfelag upptikið í FUR, Tabletop Føroyar. Endamál felagsins er, at betra um borðspælsumhvørvi í Føroyum. Hetta verið seg borðspøl, rolluspøl, samlukortspøl ella miniaturspøl.

***FUR umboðar samantalt umleið 4.000 børn og ung í Føroyum yngri enn 30 ár, sum eru í sjálvbodnum barna- og ungdómsfelagsskapum við fjølbroyttum frítíðarvirksemi innan sjónleik, tónleik, føroyskan dans, kórsang, borðspøl, fráhaldsvirksemi, politisk ungmannafeløg, mannarættindi, kristiligt barna- og ungdómsvirksemi, millumlanda barnalegur, skiftisnæmingar, skótar og annað barna- og ungdómsvirksemi.***

FUR hevur til endamáls, at:

- vera felagsumboð fyri limafelagsskapirnar
- viðgera spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi
- skapa áhuga fyri ungdómsmálum
- eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið
- umboða limafelagsskapirnar í samstarvi við myndugleikarnar
- menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm
- menna millumtjóða fatan

Á Landsfundinum í 2021 samtykti aðalfundurin broytingar í viðtøkunum viðvíkjandi krøvum til limafeløg, sum verða upptikin í FUR. Feløgini skulu hava viðtøkur, sum greitt tilskila, at felagið er ein barna- og/ella ungdómsfelagsskapur. Eisini er ásett, at fleiri enn helvtin at limunum skulu vera yngri enn 30 ár og at meginparturin av virkseminum skal vera barna- og ungdómsvirksemi.

# Fíggjarlig viðurskifti

FUR verður fíggjað á Fíggjarlógini og við veddingarpengum, sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, og við limagjaldi.

Játtanin á fíggjarlógini til FUR var í 2021 óbroytt kr. 330.000 sammett við undanfarin ár. Játtanin er til at stuðla ungdómsarbeiði til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Stuðul verður m.a. veittur til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar, sum FUR stendur fyri.

FUR fekk lutað kr. 2.376.700 frá Sp/f Ítróttarvedding í 2021 í sín part.

Harafturat fekk FUR kr. 4.100 í limagjaldi frá limafeløgunum í 2021.

# Starvsstjórnin

FUR verður stjórnað av einari starvsstjórn, sum hevur 5 limir og 2 eykalimir. Starvsstjórnarlimir verða valdir á landsfundinum fyri eitt ár í senn, men formaðurin verður valdur fyri 2 ár og síðan fyri 1 ár.

Starvsstjórnin vald á Landsfundi FUR's í 2021:
Rói B. Poulsen, *formaður*
Bogi Petersen, *nevndarlimur*
Ragna Maja Kruse, *nevndarlimur*
Ebba Sofía Kruse, *nevndarlimur*
Brandar Heðinsson, *nevndarlimur*
Asta Abrahamsen, *eykalimur*
Silja Av Reyni Wennerström, *eykalimur*



Starvsstjórnin hevur havt 5 fundir í starvsstjórnarskeiðnum 2021-2022.

# Dagliga virksemið

FUR umsitur árliga stuðulin sambært løgtingslóg um ítróttarvedding til limafeløg og lokalfeløg og sambært reglugerð og viðtøkum fyri FUR og skal tryggja m.a., at treytirnar eru loknar, og at stuðulin verður nýttur sambært reglugerðini.

Eisini umsitur FUR Stuðulsgrunn FURs, har talan somuleiðis er um fyrisiting og um starvsstjórnaravgerðir. FUR fyrireikar somuleiðis fyrispurningar og tilmæli í sambandi við limaupptøku og møgulig tilmæli um eksklusión.



Havnar KFUK skótar - ferð til Forlev Spejdercenter

FUR er virkin limur í NordUng. FUR hevur umboð í stýrinum og samskipar kunning o.a. í sambandi við, at føroysk ung luttøka á ráðstevnum, leiðaraskúla, ungdómsviku o.a.

Eisini er FUR virkið í verkætlanini Nordic Youth in Sustainable Communities (NUBF), sum virkar fyri at skapa burðardyggar felagsskapir og at styrkja sambandið ímillum ung í norðurlondum. FUR hevur umboð í stýrisbólkinum og í nevndini, sum játtar stuðul til verkætlanir.

FUR svarar ymsum dagligum fyrispurningum í sambandi við barna- og ungdómsarbeiði frá einstaklingum, felagsskapum í Føroyum og uttanlands og frá føroyskum myndugleikum o.a. FUR kann eisini taka stig til verkætlanir og luttaka í verkætlanum.

# Árligur stuðul

Fyri at fáa árligan stuðul skal talan vera um landsfelagsskap, sum er limur í FUR, ella lokalfelag, sum hevur limaskap í einum av limafelagsskapum FURs.

16 limafeløg og 19 lokalfeløg fingu játtað árligan stuðul í 2021 fyri stuðulsárið 2020.

Landsfeløgini fingu kr. 1.542.298 samanlagt, og lokalfeløgini fingu samanlagt kr. 834.402 í 2021. Samlaður árligur stuðul til limafelagsskapir og lokalfeløg var kr. 2.376.700 í 2021.

Limafelagsskapir, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári við umboðum í minst trimum av hesum økjum: Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Vágum, Eysturoy, Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.




*Stk. 4.* Lokalfeløg, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir undir 30 ár tann 31.12. í undanfarna ári. Eru fleiri enn eitt lokalfelag í sama býi/bygd, skulu tey fylgjandi lokalfeløgini hava í minsta lagi 25 gjaldandi limir hvørt.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. Árliga fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur við ásetingum, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Verið limir í landsfelagi í minsta lagi eitt ár, áðrenn tey kunnu søkja um stuðul - tó undantikið úr Stuðulsgrunni FURs.
8. Limaskap í einum landsfelagi. Lokalfeløg kunnu - í stuðulshøpi - bara vera limir í einum landsfelagi.
9. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.

Næmingafeløg verða ikki roknað sum lokalfeløg, men tey kunnu søkja stuðul, sum er kr. 2.000,- hvørt ár. Stuðul kann ikki verða veittur ítróttarligum endamálum.



Skótadepilin hjá Skótaliði KFUMs ímillum Tjarna í Havnadali, sum var tikin í nýtslu í juli í 2021

# Stuðulsgrunnur FURs

Eftir umsókn kann stuðul verða latin limafelagsskapum og lokalfeløgum fyri serliga góðar verkætlanir børnum og ungum at gagni ella fyri samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin.

Stuðul úr Stuðulsgrunni FURs verður býttur so ofta, sum starvsstjórnin heldur tað hóska best. Ongar umsóknarfreistir eru galdandi, og umsóknir koma til viðgerðar og verða svaraðar, so hvørt tær koma inn.

Tey, sum fáa stuðul úr Stuðulsgrunni FURs, hava skyldu til at lata FUR skrivliga frásøgn frá tí stuðlaðu verkætlanini í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at hon er framd. Frágreiðingarnar verða lagdar á heimasíðu FURs fur.fo. Stuðul verður bert latin eina ferð til sama tiltak. Starvsstjórnin tekur støðu til umsóknirnar. Starvsstjórnin kann eisini lata vera við atveita stuðul, um eingin skikkað umsókn eftir hennara meting er komin.



Ung í dansi - Dansiferð til Brønderslev

Søkt verður um stuðul úr Stuðulsgrunninum umvegis heimasíðu FURs.

## Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs

Í roknskaparárinum 2021 varð stuðul latin til verkætlanir úr Stuðulsgrunni FURs samantalt kr. 330.871.

**Stuðulsgrunnur FURs 2021 – umsøkjarar, verkætlanir og avgerðir**

| Stuðulsgrunnur FURs | Verkætlan | Stuðuls-umbøn | Avgerð | Játtað |
|---|---|---|---|---|
| **KFUM skótarnir við Løkin** | 2 smáttur, 1 goymsluskúrur og 1 shelter | 80.000 | Ja | 40.000 |
| **KFUM skótarnir í Føroyum** | Endurbyggja hoyløguna | 80.000 | Ja | 40.000 |
| **XPERIMENT** | Upptøkur av sangum | 25.000 | Ja | 18.000 |
| **Havnar KFUK skótar** | Lega á Forlev skótasentur, 25 luttakarar | 35.000 | Ja | 35.000 |
| **Blákross Ungdómur** | Flytbar rúsfrí barr (vognur) | 50.000 | Ja | 50.000 |
| **Blákross Ungdómur** | Hettutroyggja til at skapa felagskenslu | 26.312,50 | Nei | - |
| **Amnesty Ung** | Tiltak á G-festivalinum um samtykki | 14.500 | Ja | 14.500 |
| **Amnesty Ung** | Skeið – lær at gera film við fartelefon, 3 pers. | 7.425 | Ja | 7.425 |
| **Skótalið KFUM's** | Reynalegan – lega fyri allar føroyskar skótar | 48.750 | Ja | 40.000 |
| **Tabletop Føroyar** | Wargame Miniature verkstova | 6.170 | Ja | 6.170 |
| **Tabletop Føroyar** | Borðspælsløtur í fólkaskúlum | 26.908 | Ja | 10.000 |
| **Tabletop Føroyar** | Samleiki til felagið | 13.090 | Nei | - |
| **Skótalið KFUM's** | Integratión av nýggjum leiðarum | 10.000 | Nei | - |

Starvsstjórnin hevur viðgjørt 13 umsóknir um stuðul úr Stuðulsgrunni FURs í 2021 frá lands- og lokalfeløgum í FUR. 10 verkætlanir fingu játtandi svar, 3 umsóknir fingu noktandi svar.

# Heiðurslønir

Starvsstjórnin í FUR letur árliga heiðursløn til verkætlanir og einstaklingar. Heiðurin verður latin á landsfundi FUR's. Latnar vera upp til tríggjar heiðurslønir. Heiðursløn FURs er eitt heiðursbræv og ein heiðursløn kr. 5.000 - 10.000.

Veittar kunnu verða millum ein og tríggjar heiðurslønir. Heiðurslønin verður givin einstaklingum og verkætlanum.

Øll kunna innstilla verkætlanir og einstaklingar til heiðursløn m.a. eru tað ikki bert feløgini í FUR og nevndirnar í feløgunum, sum kunnu innstilla, men eisini einstakir limir, eins og foreldur v.m.

Til ber at lata inn fleiri innstillingar og at senda innaftur áður innsendar innstillingar.

Endamál FURs við at lata heiðurslønina er:

1. at geva eldsálum innan barna- og ungdómsfelagarbeiði viðurkenning
2. at geva virknum barna- og ungdómsfeløgum viðurkenning fyri sítt arbeiði
3. vekja áhugan millum børn og ung fyri sjálvbodnu barna- og ungdómsfelagsskapunum
4. at vísa á samfelagsliga týdningin av arbeiðinum hjá sjálvbodnum barna- og ungdómfelagsskapum.

## Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2021

Á landsfundinum hjá FUR 20. mars 2021 handaði Rói B. Poulsen formaður í FUR heiðurlønirnar, sum stjórnin hevði avgjørt at lata til Brestir B. Restorff, Ung í Dansi og fylkisstjóri í Skótafylki Sigmunds Brestissonar, til verkætlanina Time Out hjá Sinnisbata og til Fríbjørg Joensen Poulsen, føroyskur barnadansur í Sumba.

### Brestir B. Restorff, Ung í Dansi og fylkisstjóri í Skótafylki Sigmunds Brestissonar

Heiðursløn 2021 varð latin Brestir, sum formaður í tveimum barna- og ungdómsfeløgum. Brestir ger eitt megnararbeiði í Ung í Dansi og sum fylkisstjóri í Skótafylki Sigmunds Brestissonar. Brestir er bæði fryntligur, og ábyrgdarfullur og fer inn í arbeiðið við heilum hjarta. Hetta merkist aftur í felagsskapunum, hann stendur á odda fyri.





### Fríbjørg Joensen Poulsen, føroyskur barnadansur í Sumba

Heiðurslønin 2021 varð latin Frígerð fyri hennara megnar sjálvboðna arbeiði fyri føroyska dansin. Fríðbjørg er eldhugað og ótroyttilig og er ein av stóru orsøkunum til, at føroyski dansurin í Sumba blómar. Fríðbjørg er enn hvørt fríggjakvøld gjøgnum dansiveturin og kvøður við børnunum, lærir tey dansispøl og gevur børnunum av síni hollu vitan um dansin.

### Verkætlanin Time Out hjá Sinnisbata

Heiðursløn 2021 varð latin Time Out hjá Sinnisbata, sum skipar fyri bólkum til børn og ung millum 12-18 ár, ið eru avvarðandi av fólki við sálarsjúku. Tað er týdningarmikið at lofta avvarðandi, tí teirra tørvur verður ofta settur til síðis ella gloymdur. Ung, sum hava luttikið, siga m.a., at tey kenna seg minni einsamøll, og at tey kenna seg aftur í støðuni hjá hinum luttakarunum - afturmeldingarnar hava verið sera góðar.



# Dátuvernd

Í samband við at nýggja dátuverndarlógin kom í gildi 1. januar 2021 hevur FUR heitt á Eli Thorsteinsson, advokat um at gera vegleiðing og skabilónir um dátuvernd ætlað til feløgini í FUR.

Tilfarið fevnir um:

- Vegleiðing
- Skabilón til Privatlívspolitikk - privatlívspolitikkurin skal vera atkomuligur fyri limirnar í feløgunum
- Skabilón til Yvirlit yvir viðgerðir av persónupplýsingum - yvirlitið verður nýtt til at skráseta, hvussu feløgini viðgera persónsupplýsingarnar.

Um feløgini brúka dátuviðgerar, so hava flest dátuviðgerar standardavtalur. Víst verður til heimasíðuna hjá Dátúeftirlitinum viðvíkjandi standard dátuviðgerðaravtalu og til lógir og reglur um dátuvernd.

Feløgini skulu eftir dátuverndarlógina upplýsa í Privatlívspolitikkinum, at vanligir persónsupplýsingar verða latnir Føroya Ungdómsráð í samband við limaskap og umsókn um árligan stuðul.

Feløg í FUR, sum koma undir § 11 í dátuverndarlógina vegna t.d. politiska ella átrúnaðarliga sannføring kunnu ístaðin fyri at lata limalistan til FUR fáa eina váttan frá einum góðkendum grannskoðara, sum eftirkannar skjalagrundarlagið undir limalistanum t.d. limaskipan og kontoavrit til tess at staðfesta, at limalistin inniheldur limir yngri enn 30 ár, sum hava goldið í minsta lagi kr. 100 í limagjaldi í stuðulsárinum.

Starvsstjórnin legði tess vegna fram uppskot um broyting í reglugerðini á landsfundinum 2021, sum varð samtykt. Ásett er í Reglugerð FURs, at letur felagið ikki inn limalista, kann felagið ístaðin veita eina váttan frá góðkendum grannskoðara, ið við síni undirskrift váttar limatal og limagjaldsinntøkur. Grannskoðarin skal í slíkum førum gjøgnumganga limalistar og kontoavrit felagsins, fyri at staðfesta og vátta samlaða limatalið av limum yngri enn 30 ár, ið hava móttikið og goldið uppkrav um limagjald, uppá í minsta lagi 100 kr í stuðulsárinum.

# Nýggj heimasíða

FUR hevur fingið nýggja heimasíðu. Á heimasíðuni ber til at síggja tíðindi, tiltøk og skeið, sum FUR bjóðar feløgunum og frágreiðingar frá feløgunum um verkætlanir, sum hava fingið stuðul úr Stuðulsgrunninum.

Sum nakað nýtt verður árliga skrásetingin, umsóknir um árligan stuðul og umsóknir til Stuðulsgrunnin, umframt innstillingar til heiðurslønir, latnar inn umvegis heimasíðu FURs.

# Kanning - frítíðarvanar

Kanningin "Framtíðar frítíðarvanar og savningarstøð í Føroyum" varð løgd fram á ráðstevnu 2. mars 2022 í Norðulandahúsinum. Kommunufelagið, ÍSF, FUR, Fróðskaparsetrið, Fólkaheilsuráðið, UMMR og ávísar kommunur í Føroyum stóðu fyri ráðstevnuni.

Endamálið við frágreiðingini hevur verið at veita eitt samlað innlit í frítíðarlívið í Føroyum m.a. hvussu virksemið verður skipað, hvørjar umstøður eru til ítrótt og frítíðarítriv kring landið, og hvussu kor og trivnaður annars eru.




Dánjal Augustinussen, SU og Amnesty Ung

## Kanningarúrslit

Kanningarúrslitini vísa, at føroyingar sum heild eru nógv uppi í sjálvbodnum arbeiði. Meiri enn helvtin av vaksnum føroyingum hevur verið uppi í sjálvbodnum arbeiði seinasta árið, og serliga á bygd verður ógviliga nógv sjálvboðið arbeiði gjørt.

Hóast nógv gera sjálvboðið arbeiði, hava feløgini trupult við at finna nóg mikið av sjálvbodnum. Nógv sjálvboðið arbeiði verður gjørt í øðrum samanhangi. Til dømis virkar næstan ein triðingur av teimum vaksnu sjálvboðin í kirkjum og samkomum. Tí kann talan vera um tey somu, sum sjálvboðin taka sær av nógvum ymiskum uppgávum, og í miðal verður nógv tíð brúkt til sjálvboðið arbeiði.

### Virði

Kanningarúrslitini vísa eisini, at fleiri feløg í Føroyum grunda sítt virksemi á serstøk virði. Feløgini, sum bjóða annað enn ítrótt siga seg byggja á:

1. menniskjanslig virði
2. átrúnaðarlig virði
3. Grøn virði.

60% av feløgunum siga seg byggja á eini ella fleiri tilskilað virði.

## Avbjóðingar



Bogi Sigurstein, Skótalið KFUMs

Kanningin vísir, at tær vanligastu avbjóðingarnar eru, at:

1. fáa limir at sita í nevnd
2. útvega onnur sjálvboðin
3. kappast við onnur frítíðartilboð.

Kanningin vísir, at fjórði hvør, ið ikki er sjálvboðin, vísir áhuga fyri at gerast sjálvboðin, og at sosialur felagsskapur og møguleiki fyri at brúka førleikar og at læra okkurt nýtt eru nakrir av teimum táttum, sum serliga síggja út til at hava áhuga hjá hesum bólki.

Her kann tað hava týdning bæði at hugsa um, hvat fær sjálvboðin at vera við, og hvussu feløgini yvirhøvur arbeiða við at fáa og halda fast við sjálvboðin.

### Langtíðarætlan

Hvat kann gerast meira fyri at útvega fleiri sjálvboðin til feløgini? Tað sær tí út til, at fleiri feløg kunnu gerast virknari og leggja ætlanir um, hvussu fleiri sjálvboðin kunnu útvegast, sammett við nú, ið bert fá feløg siga seg hava langtíðar ætlanir við hesum. Donsk kanning, at feløg við ætlanum av hesum slagi hava ikki so ilt við at fáa sjálvboðin (Laub 2012).

## Framløgur hjá feløgum í FUR

4 umboð fyri feløg í FUR høvdu framløgur um tey virði, sum feløgini geva børnum og ungum og um avbjóðingarnar hjá feløgunum og hvussu feløgini kunnu fáa góðar karmar at virka og mennast. Hesi vóru Bogi Sigurstein frá Skótaliði KFUMs, Birna Heinesen frá Dramaverkstaðnum, Fía Lindenskov frá Føroya KFUK skótum og Havnar KFUK skótum, og Dánjal Augustinussen frá SU og Amnesty Ung.

Framløgurnar vístu fjølbroytni í frítíðarlívinum og tey týðandi virði hesi feløg geva børnum og ungum í Føroyum. Eisini varð víst á avbjóðingarnar hesi feløgini hava við m.a., at fáa stuðul frá land og kommunu.



Birna Heinesen, Dramaverkstaðið

# Skeið um sosialar miðlar

FUR fyriskipar skeið til feløgini um strategiskt samskifti á sosialum miðlum.

Sosialir miðlar geva felagsskapum møguleikar at røkka út til sínar limir, foreldur, leiðarar og lokalsamfelagið. Men hjá nógvum er tað kanska møtumikið at fara undir, tí tað er so nógv annað arbeiði sum skal gerast.
Tá ein gevur tær stundir til at leggja eina miðvísa ætlan fyri samskifti á sosialum miðlum, kann fáast meiri burturúr. Uppgávan kann gerast minni arbeiðskrevjandi, tí ein hevur hugsað longur frameftir og orkan verður brúkt miðvísari.

Skeiðið er til sjálvbodnar felagsskapir, ið hava eitt ynski um, at røkka børn, ung, leiðarar, foreldur, politikarar og lokalsamfelagið á sosialum miðlum. Um so er, at feløgini taka undir við, at nema sær vitan um sosialar miðlar, so er ætlanin at skipa fyri skeið aftur í hesum evninum.

# Lýsingastuðul - portal.fo

FUR hevur fingið kr. 100.000 frá Portalinum í stuðli til lýsingar, av teimum kr. 50.000 til Les og Lær í Føroyum og kr. 50.000 til at kunna um Barna- og ungdómsarbeiði hjá feløgum, sum eru limir í FUR.

FUR kann sostatt lýsa ókeypis fyri limafelagsskapir og lokalfeløg í sambandi við lýsingarstuðulin frá Portalinum
Tað ber til t.d. at lýsa um:

1. Felagið generelt
2. Melda teg sum lim
3. Aðalfund
4. Tiltak (tað kann vera bæði limatiltak og alment tiltak)



Skótalið Magnus Heinasonar, KFUK-skótarnir í Klaksvík og Skótalið Nólsoyar Pálls - smáskótadagur

Til endamálið hevur FUR gjørt eitt einfalt umsóknarskjal. Spurt verður, um endamálið við lýsingini, og um dagfesting, nær lýsingin skal takast av. Eisini verður biðið um ein stuttan tekst til lýsingina - mælt verður til at leggja meiri útgreinaðan og nágreiniligan tekst á heimasíðuna ella á facebook profilin hjá felagnum, *har* lýsingin skal leinkja til t.d. heimasíðu ella facebook og mynd. Feløg í FUR hava brúkt møguleikan at lýsa ókeypis á portal.fo ígjøgnum FUR.

# Les og Lær í Føroyum

Les og Lær í Føroyum er eitt samstarv millum FUR, Mentamálaráðið, yrkisfeløg og arbeiðsgevarafeløg.
Ein grundleggjandi fortreyt fyri, at ung útbúgva seg í Føroyum, er kunning um útbúgvingartilboðini í Føroyum.
Tískil tók FUR í 2013 stig til Les og Lær í Føroyum.




Les og Lær í Føroyum fevnir um tvær heimasíður, har upplýsingar um læru og lestrarmøguleikar í Føroyum eru savnaðar. Fyrstu 4 árini var bók útgivin, men avgjørt var ikki at úgeva tilfarið í bók og tí ístaðin at raðfesta talgilda miðling.

Á heimasíðuni www.les.fo eru lýsingar av útbúgvingum, vegleiðingar, filmsbrot og onnur kunning. Heimasíðan www.studyinfaroeislands.fo er ætlað lesandi úr útlondum og lýsir tí útbúgvingar, stakgreinar og onnur lestrartilboð, sum eru áhugaverd í hesum sambandi. Síðan fevnir eisini um praktisk viðurskifti, t.d. uppihaldsloyvi, arbeiðsloyvi, bústaðarmøguleikar, skattlig viðurskifti, livikostnað o.a.

Tilfarið er savnað inn frá Mentamálaráðnum, Yrkisdeplinum, útbúgvingarstøðum, stovnum og fyritøkum.

Í 2021 eru ymsar betringar gjørdar í heimasíðuskipanini m.a. tabellir og tillagingar av komandi freistum.

# Nevndarumboðan, skeið v.m.

## NordUng (fyrrverandi NSU)

**Vision**

NordUng's vision är, att vara plattform för Nordens mångfaldiga frivilliga ungdomsarbete, där kompetensutveckling, inspiration och inblick i aktuella ämnen skapas i en innovativ och stark nordisk gemenskap.

NSU broytti í 2021 navn til NordUng. NordUng er ein paraplyfelagsskapur fyri ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum, og samstarvar við onnur lond í Evropa.

Endamálið hjá NordUng er at styrkja samstarvið og felagskensluna millum politiskar óheftar ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum og at fremja fakligu- og mentanarligu endamálini, sum hesi feløgini virka fyri.

Á hvørjum ári skipar NordUng fyri ungdómsviku, ráðstevnum og verkstovum fyri børn og ung, sum limafeløg og lokalfeløg í FUR hava møguleikan at senda umboð til.

FUR hevur havt umboð í stýrinum í NordUng seinastu 7 árini. Aðalfundurin hjá NordUng verður 2. apríl 2022 í Tórshavn og umboð fyri FUR stillar upp til stýrið.



Brandar Heðinsson, sum hevur umboðað FUR í stýrinum í NordUng og onnur ung

## Nordic Youths in Sustainable Communities

NUBF

FUR eru virkin partur í Nordic Youths in Sustainable Communities (NUBF), sum Norðurlandaráðið fíggjar. Dans Ungdoms Fællesråd (DUF) leiðir verkætlanina saman við systirfelagsskapirnar í Norra, Svøríki, Íslandi og FUR í Føroyum.

FUR hevur 2 umboð í stýrisbólkinum fyri verkætlanini.

Endamálið hjá NUBF er, at menna burðardyggar felagsskapir og at knýta sterkari bond millum ung í Norðurlondum.

NUBF bjóðar skeið, bæði fysisk og online, og ein stuðulsgrunn, sum stuðlar verkætlanir til ung.

## NUBF – ungdómsvenjing



Í 2021 lúttóku 5 ung úr feløgum í FUR á Ungdómsvenjingini á ungdómsoynni.

Evnið var norðurlendskt samstarv, burðardygd og at skapa enn meiri inkluderandi felagsskapir. Aldursbólkurin var 16-30 ár.

Við at luttaka á “Ungetræning” fingu ung møguleikan at fáa íblástur til verkætlanir, praktiska hjálp við at søkja um stuðul úr grunninum og møguleikan at hitta ung úr øðrum norðurlondum, sum tey kunnu skipa fyri verkætlanum saman við.

Føroysk luttøka er í trimum verkætlanum í NUBF.

## NUBF - Norðurlendski ungdómsgrunnurin




Endamálið við norðurlendska ungdómsgrunninum er, at menna burðardygg samstørv millum ungdómsfelagsskapir í Norðurlondum.

Við stuðli úr grunninum kunnu ung skipa fyri virksemi tvørturum landamørk og styrkja netverk millum ung í Norðurlondum.

Fyri at søkja um stuðul mugu í minsta lagi 2 lond verða umboðað í verkætlanini. Høvuðsevnini í 2022 eru fólkaræði, burðardygd og mentan. Ung í aldrinum 16-30 bæði leggja til rættis og standa fyri verkætlanunum.

Tríggjar verkætlanir við umboðum úr Føroyum fáa í løtuni stuðul úr grunninum.

Umsóknarfreistirnar eru á heimasíðu FURs.

## Norðurlendsk verkætlan um umhvørvi og samskifti

Eitt umboð fyri Havnar KFUK skótar luttekur, vegna FUR, í norðurlendskari verkætlan um umhvørvi og samskifti. Verkætlanin er ein partur av "Burðardyggir lívsstílar" hjá Norðurlandaráðnum. Umboð fyri hvørt norðurland arbeiða við samskifti frá og til ung.
Verkætlanin fer fram í 4 ár og nýggj ung verða vald á hvørjum ári.

## Umhvørvisjournalistikkur




Eitt umboð lutteku, vegna FUR, í verkætlan, sum gevur ungum úr Norðurlondum og Kanada møguleika fyri at læra og samstarva um umhvørvisjournalistikk, skriva greinar, tíðindafrágreiðingar og gera ymiskt tilfar.

Verkætlanin er frá juni 2021 til árslok 2022. 16 fólk í aldrinum 18-25 ár; 8 úr Norðurlondum og 8 úr Kanada luttaka í verkætlanini.

## NORDBUK

Uttanríkis- og Mentamálaráðið hevur heitt á FUR um, at tilnevna umboð og varaumboð í NORDBUK (Nordisk Børne-og Ungdomskomité. Nordbuk er ráðgevandi og samskipandi í yvirskipaðum barna- og ungdómsmálum í Norðurlandaráðnum.

Formaður FURs er umboð vegna FUR í Nordbuk og skrivstovan er varaumboð.



## Ávirkanin av korona á børn og ung í Norðurlondum

Uttanríkis- og Mentamálaráðið hevur heitt á FUR um, at tilnevna eitt ungdómsumboð í ein serfrøðingaarbeiðsb*ólk* til verkætlanina ″Barn og unges rett til å bli hørt, koronakrisens konsekvenser for barn og ungdom i Norden”. Umboðið í serfrøðingabólkinum er frá SU og Amnesty Ung.

Verkætlanin skal savna tilfar og vitan um koronatiltøkini hjá norðurlendsku londunum og hvussu tey hava ávirkað umstøðurnar hjá børnum og ungum, at luttaka og hava ávirkan.

## Dynamo – online skeiðspakki

NordUng hevur gjørt ein online skeiðspakka til barna- og ungdómsfelagsskapir – til bæði limir og leiðarar Skeiðið er skipað í modul við ymsum evnum t.d. leiðsla, samskifti, tiltøk og fíggjar viðurskifti.

Til ber, at taka øll modulini ella velja evni burturúr, alt eftir áhuga og tørv.

Skeiðini eru tøk á heimasíðu FURs.